HEILSUMÁLARÁÐIÐ

2. januar 2023
Mál: 23/10433-7
Viðgjørt:GMM

**Javntekstur**

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum

| **Galdandi orðingar** | **Løgtingslógaruppskotið** |
|---|---|
| “**§ 24.** Øll, sum hava fylt 18 ár og sum eru fevnd av hesi lóg, gjalda 175 kr. um mánaðin, umframt 0,70 % av skattskyldugu inntøku sínari til Heilsutrygd.<br><br>*Stk. 2.* TAKS krevur gjaldið inn fyri Heilsutrygd. Heilsutrygd rindar kostnaðin av hesum.<br><br>*Stk. 3.* Rindar ein persónur, ið er fevndur av lógini, ikki gjaldið innan ásettu freist, verður rentutilskriving framd. Rentutilskrivingin er 0,7% fyri hvønn byrjaðan mánað. Sama er galdandi fyri skuldskrivaða rentu. Lønareftirhald og panting kann eisini fara fram sambært reglunum í skattalógini.<br><br>*Stk. 4.* (Strikað).” | **§ 1**<br><br>Í løgtingslóg nr. 178 frá 22. desember 2009 um almenna heilsutrygd (Heilsutrygdarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar:<br><br>**1.** Yvirskriftin yvir § 24 verður orðað soleiðis:<br>*“Gjald”*<br><br>**2.** Í § 24 verður aftan á stk. 1 sum nýtt stk. sett:<br>“*Stk. 2.* Persónar, sum eru fevndir av stk. 1, men sum rinda heilsutrygdargjald í øðrum Norðanlandi vísandi til “Nordisk konvention om social sikring” og sum ikki kunnu draga gjaldið frá, vísandi til skattalógina, kunnu eftir umsókn verða undantiknir gjaldskyldu. Undantøkan hevur virknað frá tí degi, umsóknin er móttikin. Tá ið umsøkjarin ikki longur rindar heilsutrygdargjald í øðrum Norðanlandi, hevur hann skyldu at boða Heilsutrygd frá hesum.”<br>Stk. 2 og 3 verða eftir hetta stk. 3 og 4.<br><br>**3.** Í § 24 verður sum stk. 5 sett:<br>“*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um viðurskifti viðvíkjandi umsókn og fráboðanarskyldu sambært stk. 2.” |

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo

| | |
|---|---|
| "**§ 26.** Heilsutrygd kann krevja inn allar upplýsingar, ið eru neyðugar fyri at umsita lógina, m.a. hagtøl frá sjúkrahúsum, kommunum, klinikkum, læknum, tannlæknum v.m." | **4.** Í § 26 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:<br>"Til nýtslu í sambandi við umsókn um gjaldsfrítøku sambært § 24, stk. 2 kann Heilsutrygd útvega sær upplýsingar frá øðrum viðkomandi myndugleikum, herundir TAKS."<br><br>**5.** Í § 26 verða sum stk. 2 og 3 sett:<br>"*Stk. 2.* Hevur persónur givið Heilsutrygd skeivar upplýsingar ella tagt um umstøður, sum hava týdning fyri gjaldsfrítøku sambært § 24, stk. 2, kann Heilsutrygd eftirfylgjandi krevja inn gjaldið, ið viðkomandi av órøttum ikki hevur goldið.<br>*Stk. 3.* Rindar ein persónur, ið er fevndur av løgtingslógini, ikki gjaldið innan ásettu freist, verður rentutilskriving framd. Rentutilskrivingin er 0,7% fyri hvønn byrjaðan mánað. Sama er galdandi fyri skuldskrivaða rentu." |
| | **6.** Aftan á § 26 verður sett:<br>"**§ 26 a.** Heilsutrygdargjald og renta, ið er fallið til gjaldingar, kann verða innheintað við panting.<br>*Stk. 2.* TAKS fremur panting fyri heilsutrygdargjald og skuldskrivaða rentu eftir stk. 1 eftir reglunum fyri innkrevjing av skattum.<br>*Stk. 3.* Heimilað verður TAKS at krevja inn skuld og innkrevjingarkostnað sambært hesi løgtingslóg við at afturhalda í A-inntøku hjá teimum gjaldskyldugu sambært reglunum um hetta í Skattalógini." |
| | **§ 2**<br><br>Hendan løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2024 |